## DAGSINS MEINING

# Handverksvinna og listahandverk

Seinastu vikuna hevur verið sera forvitnisligt og gott tiltak í Müllers pakkhúsi í Havn og í Norðurlandahúsinum. Talan er um tiltakið "Snið og handverk", sum er sølufram-sýning hjá Gluggaglæmu. Hetta er afturvendandi tiltak, men í ár er nógv meira gjørt burtur úr, bæði tí at áhugin fyri at vera við hevur verið so stórur og tí fyrireikararnir eisini hava valt at skipa fyri eini ráðstevnu undir heitinum "Snið & handverk í heimligum og altjóða høpi". Tann ráðstevnan verður hildin í Norðurlandahúsinum mikudag.

Sjáldan hittir tú so mong glað og fegin andlit sum á tiltøkunum hjá Gluggaglæmu. Tey, sum vitja og tey, sum sýna fram. Tað, sum hendur og hugflog í heimum og á handverksvirkjum kring alt Føroya land hava skapt, verður víst fram í teimum ómetaliga hugnaligu hølunum í Müllers pakkhúsi, har tey ordiliga koma til sín rætt. Tað er líkasum, at øll tey mongu pløggini og lutirnar annars, sum føroyskar hendur hava evnað til, fara upp í eina hægri og felags eind við vøkru kálkaðu veggirnar, træstólparnar og tí steinlagda gólvinum í tí aldargamla pakkhúsinum. Betri umhvørvi kundi ikki verið funnið til slíka framúr framsýning við føroyskum handverki og listahandverki. Og gott er, at Norðurlandahúsið eisini er partur av hesum, tí talan er eisini um listarliga mentan og er hetta eisini eitt signal til okkara myndugleikar um, at vit í Føroyum vilja eisini vera við til at menna handverkslistina til eina vinnu, eins og grannalond okkara hava gjørt. Hyggið bara eftir Grønlandi.

At síggja alt hetta vakra, sum kvinnur og menn hava skapt við sínum hondum og hugflogi, er einki minni enn ein stóruppliving. Tað er ein sonn frøi at kunna ganga millum básarnar og práta við tey, sum hava evnað lutirnar til. Slík framsýning gevur okkum eina kenslu av, at vit í Foroyum eru rík uppá bæði ráværu at evna burtur úr og at eiga fólk, sum hava evni og hugflog til at skapa nakað.

Kanska hava vit givið hesum ov lítið fær, tikið tað sum eina sjálvfylgju, tí hetta er "bara" ein partur av okkara mentan. Men nú tað eru fólk, sum síggja møguleikan at menna hesi handverkini, so hóma vit spíran til eitt nýtt vinnuvirksemi. Vinna er so nógv. Og oftani hava vit lyndi til at gloyma hesi smáu tingini, tvs. tær heimaarbeiðandi kvinnurnar, tær kjallara- og loftsfyritøkurnar. Hetta at kunna flætta saman mentan og handverk og list soleiðis at hesi eisini gerast til eina livandi og gevandi vinnu er nakað, sum vit eiga at síggja nakað stórt í. Síggja møguleikar í.

Fleiri ungfólk fáa sær útbúgving innan hesi handverk, eitt nú innan sniðgeving, og koma so við og við at menna henda partin av handverki og vinnu í Føroyum, soleiðis at onkur teirra eisini kann koma at gera seg galdandi í útlandinum. Soleiðis at spírin, sum nú er við at verða lagdur, ein dag kann gerast til eina blómandi handverksvinnu. Gerast eitt bein, um enn lítið so tó prýðiligt og virðiligt og harvið virðismikið bein undir búskapinum.

Til luttakararnar í hesum tiltaki, til fyrireikararnar og til øll tey, sum vilja hesum handverki væl: tillukku og góða eydnu víðari. Vónandi fer ráðstevnan í Norðurlandahúsinum at vera við til at skapa uppaftur størri áhuga fyri og vera við til at menna henda so týðandi men oftani gloymda part av okkara fólksligu mentan, sum okkara myndugleikar eiga at geva størri gætur.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tilfeingisgjøld

*Frímund Hansen*

Nú so nógv verður tosað um at fiskurin í havinum er ogn Føroya Fólks. At tað líkist ongum sum landskassin slongir um seg við loyvum til Per og Pól, vinir og kenningar. Tilfeingi sum landi brúkar nógvar pengar uppá at samráða seg til o.s.fr.

Er ikki neyðugt her at steðga á og hugsað eitt lítið sindur, um hví ið landi hevur tann frammíhjárætt yvirhøvur at hava nakað samráðast við eitt nú norðmenn og russar um.

Uttan at kenna søguna nóg væl, so rokni eg við, at eigarnir av Vesturvón, tá fyrst í 70unum vóru illa á holdi komnir fíggjarliga. Hetta av sínum knossi og baksi sum tað er, og áltíð hevur verið, at hava við skip at gera. Tað varð nokk tí at kommunan har vesturi kom uppí virksemi teirra tá.

Tað varð um sama mundi at Stellurnar vóru seldar av landinum, neyvan tí at hetta varð nakað gullnám. Magnus Heinason kom og fór. Nónhamar kom og fór.

Í tíðini tá eg arbeiddi hjá Kjølbro, plagdi Thulesen at tosað um, hvussu tað líka so væl kundi verið at kjølbrobátarnir (Skálaberg, Sundaberg og Sjúrðaraberg/Enniberg) vóru umbygdir ella bygdir sum rækjuskip, tí at hetta varð tað sum loysti seg best tá.

Eftir hesum omanfyri at døma, eru tað bert tvær avgerðir fyrst í 70unum sum eru orðsøk til at vit hava nøkur rættindi í Barentshavinum í dag. Avgerðin hjá monnunum aftanfyri Vesturvón, saman við kummununi har vesturi, um at halda fram uppi í Barentshavinum. Og so avgerðin í nevndini í Kjølbro um at halda fram við toskafiskiskapi, heldur enn at leggja um til rækjur.

Tað eru hesi reiðaríðini, saman við tí hjá Ennibergi, sum við treiskni og áhaldni hava vunnu og røkt okkum teyð rættindi sum vit eiga í Barentshavinum. Fyri tær útreiðslur sum landskassin hevur havt av viðlíkahaldi av hesum tilfeingið, er goldið fyri í ríkiligt mát ígjøgnum skattir og avgjøld frá hesum feløgum.

# Svar til tveir spurningar frá Rolf Guttesen

**Høgni Hoydal**



Rolf Guttesen., lektari á lærda Háskúlanum í Keypmannahavn, spyr meg tveir spurningar í bløðunum.

**1. Havi eg sjálvur skrivað mína talu, ið eg helt á fólkatingi 6. september?**

Svarið er sjálvandi ja. Eg havi gjørt og skrivað allar tær meira enn 20 talurnar, ið eg havi hildið á fólkatingi higartil. Onkuntíð havi eg skrivað tær rættiliga nágreiniliga, áðrenn eg haldi tær. Men oftast eru tað stikkorð, sum eg síðani brúki at halda taluna við frá røðararapallinum.

**2. Skulu eitt nú Canada og USA roknast við, tá eg havi víst á, hvat landa- og sjóøki Grønland hevði átt, um teir nýttu ein eins lítlan part (0,6%) av síni fíggjarlóg sum Danmark ger, til tess at fasthalda fullveldið yvir Grønland?**

Svarið er: Ja, Rolf Guttesen kann rokna hvat sum helst landa- og sjóøki í heiminum við. Eg havi í míni røðu víst á, at Danmark rindar 0,6% av síni fíggjarlóg árliga til Grønland og heldur harvið fast um danskt fullveldi og yvirvaldsrætt á einum landa- og sjóøki, sum er 30 ferðirnar størri enn tað danska. Til Føroya rindar Danmark 0,1% árliga av síni fíggjarlóg til tess at krevja fullveldið yvir Føroyum - og føroyska landa-og sjóøkið er tvífalt so stórt sum tað danska.

Til tess á vísa á, hvussu langt úti hetta er, havi eg til samanberingar víst á tvey hugsað dømi: Um Føroyar rindaðu 0,1% av okkara fíggjarlóg og fingu tað sama afturfyri sum Danmark, so høvdu vit kunnað kravt fullveldið yvir einum landa- og sjóøki tvífalt so stórt sum okkara fyri 4 mió. krónur um árið.

Um Grønland á sama hátt rindaði 0,6% av síni fíggjarlóg og fekk tað sama burturúr sum Danmark, so hevði Grønland fyri 9 milliónir um árið havt fullveldi og yvirvaldsrætt á einum landa- og sjóøki sum var 30 ferðirnar størri enn Grønland.

Landafrøðingurin Rolf Guttesen kann so velja tey øki í heiminum, sum honum lystir til tess at skilja hesi dømi um, hvussu bíliga Danmark keypir sær ræðið á Føroyum og Grønlandi.

Dømini hjá mær leggur Rolf Guttesen soleiðis út, at eg vil, at Føroyar og Grønland eisini skulu gerast koloniveldi! Sera seriøs útlegging hjá Rolf Guttesen, má eg siga.

Ein sera skilagóður lærari, sum eg hevði í fólkaskúlanum, segði okkum næmingum einaferð eitt, sum eg ongantíð havi gloymt: "Fólk, sum ikki skilja dømir og myndatalu, skulu tit ansa tykkum fyri! Um tildømis onkur fer at siga við ein yrkjara, sum hevur samanborið eitt vakurt konufólk við eina vakra rósu: Hov, hov, tú! Ein rósa hevur ongi bein og bróst, so hatta passar ikki! - Ja, tá er skilagóð samrøða neyvan møgulig."

Eg bíði nú spentur eftir, at Rolf Guttesen fer at harta allar føroyskar politikarar, sum so ofta samanbera føroyska samfelagið við eitt skip ella ein skútu. Rolf Guttesen kann so spyrja teir: Hvussu nógvar hestakreftir teir meina, at føroyska samfelagið hevur - og um tað er ein trolari, ein línubátur ella eitt ferðamannaskip, teir meina við - ella, hvar masturin stendur.

Tað fer ivaleyst at gerast sera festligt at hoyra hesi komandi innlegg frá Rolf Guttesen.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.